# Føroya Tele fer inn á bretska marknaðin



*Í sambandi við nýggja samstarvið er Tróndur Djurhuus, menningarstjóri hjá Føroya Tele, valdur í nevndina í enska felagnum Telabria*

**Føroya Tele hevur keypt ein part av ensku breiðbandsfyritøkuni Telabria, sum verður mett at vera ein hin fremsta fyritøkan í heiminum innan tráðleysa breiðbandstøkni**

FØROYA TELE

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*

Á middegi hósdagin boðaði Føroya Tele frá, at fyritøkan hevur keypt seg inn í eina bretska breiðbandsfyritøku, sum gongur undir navninum Telabria.

Hendan fyritøka er ikki kend á okkara leiðum, men sambært Føroya Tele er talan um eina av teimum fremstu fyritøkunum í heiminum innan tráðleyst breiðband.

– Í royndunum at økja um marknaðar- og vakstrarmøguleikarar metir Føroya Tele tað at vera neyðugt at førka føroyska fjarskiftismarknaðin inn á nýggj virkisøki og út um landoddarnar, skrivar Føroya Tele í einum tíðindaskrivi.

Einki verður sagt um, hvussu stóran part av bretsku fyritøkuni, Føroya Tele hevur keypt, og heldur eingin upphædd verður nevnd í tíðindaskrivinum. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á leiðsluni á Føroya Tele fyri evstamark á blaðnum.

## Økja um vitan og virksemi

Føroya Tele sigur, at endamálið við keypinum er at økja um samlaða »føroyska« telemarknaðin, samstundis sum hetta gevur betri møguleikar fyri at menna føroyskar skipanir til útflutnings, eitt nú saman við føroysku KT-vinnuni.

– Áhugamálini hjá Føroya Tele eru at fáa høgliga atgongd til nýggja vitan, at fáa ein áhugaverdan strategiskan samstarvspart í Bretlandi umframt at fáa avkast.

– Keypið av partabrøvum í Telabria er fyrsta stigið inn á bretska marknaðin, men føroyska felagið arbeiðir við ætlanum um at økja útlendska virksemið saman við bretska felagnum, skrivar Føroya Tele í tíðindaskrivinum.

Í sambandi við nýggja samstarvið er Tróndur Djurhuus, menningarstjóri hjá Føroya Tele, valdur í nevndina í enska felagnum.

felagið
Tórshøll
um vikuskiftið spæla:
HOLGAR & VILLMENN
ÓKEYPIS ATGONGD
fríggjakvøldið og sunnukvøldið
BINGO
Leygarkvøldið 27. august kl. 20.00
FELAGIÐ TÓRSHØLL
Sverrisgøta 22 · FO-100 Tórshavn · Tel 31 15 65
Sosialurin 341800

## Føroyskur rokkur á DR.dk

Á mest vitjaðu donsku tíðindasíðuni DR.dk, liggur ein grein um Atlantic Music Event, umframt greinar um teir tríggjar luttakandi bólkarnar liggja løgini »Musclemanblað« hjá 200, »Døgg« hjá Gestum og »Wonderland« hjá Makrel á síðuni.

Um 200 sigur DR.dk m.a., at við heitinum Viva la Republica á nýggjastu fløguni, er eingin ivi um at bólkurin spælir punk við fullveldisboðskapi, og biður tí fólk fara á konsert, meðan tey enn kunnu kalla teir danskar.

Dr.dk er heimasíðan hjá Danmarks Radio og hetta er nógv størsta tíðindaheimasíðan í Danmark, eingin ivi er um, at PR virðið í hesum er sera stórt.

**nud**

Daewoo Leganza 2.0 CDX



Leðursetur, el-innstilling av førarasetri, servostýring, fjarstýrt sentrallás, el-rútar, el-spegl, el-sóltak, klimaanlegg og cd-spælara. Ein luksusbilur í sera góðum standi.

- Árg. sep- 1999
- Km. 78.000
- Nýggj píkadekk á eyka felgum.
- Prísur einans: *Kr. 98.600,-*

Um eingin bilur er í býti, verður STÓRUR avsláttur latin

P/f Esmar Simonsen
KAMBSDALUR · TEL 44 44 05 · 22 23 24 · WWW.ES.FO

Elding søkir eftir barsilsavloysara til skrivstovuna

Søkt verður eftir barsilsavloysara at byrja 3. okt. 2005
Vit vænta at umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Oniku á tel. 310697
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. sept.

Umsóknir skulu sendast til:
Elding Sp/f
att. Majbritt E. Winther
Postboks 1289
110 Tórshavn

- EIN BETRI LOYSN!
ELDING
ELDING Í SMS TEL 319697 - ELDING EYSTUROY TEL 449697 - ELDING Í KLAKSVÍK TEL 479697

um...
Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!